Jakob Jónsson:

# Vit mangla vong- og strikuspæl

**Kyndlaleikarin, Jakob Jónsson, leikti í fleiri ár í bestu norsku deildini, og hann hevur fleiri ferðir leikt ímóti onkrum av norsku landsliðsleikarunum. Vit hittu hann eftir landsdystin leygardagin**

HONDBÓLTUR
*Terji Nielsen*



*– Ístaðin fyri at fara av landinum at fáa ein dýran venjara til manslandsliði, kundi man heldur funnið ein bíligari her á landi, og so brúkt eitt sindur av pengum upp á yngri landslið, heldur Jakob Jónsson um framtíðina hjá føroyskum hondbólti*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

Tá vit fingu orðið beint á Jakob Jónsson beint eftir landsdystin og spurdu hann, hvat hann helt um dystin, var hann skjótur at svara.

– Eg haldi at føroyingarnir spældu ein góðan seinna hálvleik. Men hinvegin høvdu vit stórar trupulleikar í fyrra hálvleiki. Eg dugi ikki at skilja, hví vit blíva við at byggja alt okkara álopsspæl upp á bakspælararnar. Tað er umráðandi at fáa lagt trýst á mótstøðuliðið allastaðni í verjuni. Vit hava als onki vong- og strikuspæl, og tí skapa vit trupulleikar fyri okkum sjálvar.

Spurdur um hann helt at norskur hondbóltur hevði tikið seg nógv fram, síðani hann sjálvur leikti har, segði Jakob: – Eg haldi ikki, at norska kappingin er blivin so nógv betri, men hinvegin er norska landsliðið væl sterkari nú, enn tað var fyri fáum árum síðani. Tú sært nú, at allir landsliðsleikararnir spæla í stórum feløgum í Týsklandi, Spania og Danmark.

Men hvat skal sambært Jakobi Jónssyni til, áðrenn eitt føroyskt landslið kann geva einum slíkum møtustøðuliði sum tí norska ein enn skarpari gang:

– Tað er alneyðugt, at hondbóltssambandi fær nøkur ungdómslandslið upp at standa. Ístaðin fyri at fara av landinum at fáa ein dýran venjara til manslandsliði, kundi man heldur funnið ein bíligari her á landi, og so brúkt eitt sindur av pengum upp á yngri landslið, ið kundu tikið lut í smærri kappingum í t.d. Danmark. Tað átti ikki at kosta so nógv. Um slík landslið so koma, er tað eisini umráðandi, at tey verða verandi, og ikki bert eru døgnflugur, sum hvørva aftur eftir stuttari tíð.

Men heldur Jakob Jónsson, at føroyskur hondbóltur er á rættari kós?

– Tað er einki at ivast í, at hondbólturin í Føroyum er blivin nógv betri seinastu árini. Menn eru meira seriøsir nú, enn teir hava verið, og vit síggja fleiri og fleiri stór talentir. Til dømis síggja vit í dag Sveinur Justinussen, sum er eitt sera stórt talent. Ein spælari sum hann skal fara til Danmarkar og royna seg í bestu deildini har, tað hevur hann evnini til. Fáa vit fleiri spælarar út um landoddarnar at royna seg, so blívir landsliðið eisini sterkari, sigur Jakob Jónsson at enda.

Jóhan Danielsen:

# 2. hálvleikur var fantastiskur

**Kyndlamálverjin, Jóhan Danielsen, verður mettur sum besti føroyski hondbóltsmálmaðurin, men tíverri var hann bert millum áskoðararnar leygardagin**

HONDBÓLTUR
*Terji Nielsen*



*– Eg ivist ikki í, at ein maður sum Sveinur kundi staðið seg í bestu donsku feløgunum, helt Jóhan Danielsen, sum av áskoðaraplássunum fylgdi við landsdystinum leygardagin*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

Um dystin leygardagin sigur Jóhan: - Eg haldi, at okkara menn spældu ein fantastiskan seinnahálvleik, men normenninir vóru ótrúliga góðir. Leikferðin hjá teimum var ótrúliga høg, og hvørja ferð at okkara gjørdu ein feil, blivu vit straffaðir av normonnum. Eg haldi eisini, at ein týðuligur munur á okkara liði og liðnum hjá normonnum, er, at hjá Noreg kemur allatíðina maður í mans stað. Hjá okkum hvílir ov nógv á einkultum leikarum.

Men hvat skal til fyri at fáa okkara landslið á eitt enn hægri støði sambært Jóhani Danielsen?

– Eg haldi, at tað er ógvuliga umráðandi, at vit fáa pengar til ungdómslandslið. Á henda hátt ber betur til at lokka ungdómar til at blíva við at spæla hondbólt, ístaðin fyri at velja tað frá. Eisini er umráðandi, at ungir spælarar so sum Sveinur Justinussen fara av landinum at royna seg. Eg ivist ikki í, at ein maður sum Sveinur kundi staðið seg í bestu donsku feløgunum.

At enda spurdu vit Jóhan, um hann lærir nakað av at hyggja eftir teimum norsku málverjunum í einum slíkum dysti?

– Ja, tað geri eg. Tað er ótrúligt at síggja, hvussu væl teir duga at lesa skotini. Eisini sær man væl, hvussu væl verja og málmaður fylgja sínum avtalum, so at teir verja hvør sítt øki. Høvdu vit megnað at brotið hesar avtalur hjá normonnum, so var nógv vunnið, segði Jóhan Danielsen at enda.

Kári Mortensen:

# Vit hava einki vongspæl

**Ein av teimum fáu føroyingunum, ið áður hevur roynt seg í landsdysti ímóti normonnum, er Kári Mortensen. Vit fingu orðið á hann eftir dystin**

LANDSDYSTUR
*Terji Nielsen*



*Ein hin royndasti leikarin, sum vit hava átt, helt avgjørdur, at vit eiga at læra av norska vongspælinum í landsdystinum*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

Kári Mortensen var ógvuliga imponeraður av norska landsliðnum.

– Eg haldi, at normenninir vóru øgiliga góðir. Serliga vongspælið hjá teimum var í heimsflokki. Høgri vongur var bart út sagt fantastiskur! Í einum slíkum dysti síggja vit ein týðiligan mun á yrkisleikarunum og okkara amatørum. Hvør einasti feilur, ið okkara menn gjørdu, bleiv straffaður beinan vegin. Tað gingu allarhægst trý sekund frá at vit mistu bóltin í álopi, til hann lá í málinum hjá okkum í hinum endanum.

Men hvat heldur Kári so, at vit kunnu læra av einum slíkum dysti?

– Eg haldi, at vit kunnu læra sera nógv. Eitt er at normenn skora av øllum plássum, men serliga kunnu vit læra nógv av vongspælinum hjá normonnum, tí vit hava einki vongspæl. Í tí sambandi dugi eg ikki at skilja, at okkara venjari næstan ikki nýtir teir fáu vinstrahandaðu vengur, ið vit hava. Teir eru bara tveir, Heini Bentsen og Ragnar Stakksund, og Ragnar var als ikki við í hópinum í dag, og Heini fekk bert fáar minuttir á vøllinum. Eisini haldi eg, at Eli ber ov nógv á sínum herðum í málinum

Men er tað kanska ein gongd leið hjá okkum at fáa fleiri leikarar út um landoddarnar at royna seg?

– Sjálvandi er tað umráðandi, at vit fáa spælarar sum t.d. Svcin Justinussen at royna seg aðrastaðnis, men hinvegin mugu vit ikki gloyma okkara egnu kapping, ið er blivin væl sterkari av teimum mongu útlendingunum, ið eru komnir hagar. Hinvegin sær man eisini týðuligt í einum dysti sum í dag, hvussu nógv Heini Hanusarson hevur ment seg av tíðuni í TMS Ringsted, sigur Kári Mortensen at enda.

